# Viðtøkur

## Sjálvsognarstovnurin

## MEA

*Húsið fyri familjumenning*

# 4. mai 2018

## Inngangur

Góð sambond millum menniskju hava stóran týdning. Tá ið okkkurt kemur millum góðu sambondini – tað kann vera ósemjur ella annað – ella tá ið sambond brotna, er sorg og missur ein avleiðing.

Alt ov nógv børn og vaksin líða, tí at tey ikki trívast í teirra tøttu sambondum, og tað gongur út yvir tað einstaka menniskja, familjuna og samfelagið bæði nú og í framtíðini.

MEA arbeiðir fyri tryggleika og trivnaði millum menniskju. Endamál sjálvsognarstovnsins er at skapa góðar relatiónir millum menniskju, bæði í og uttan fyri parlagið. Endamálið er at geva foreldrum og børnum teirra amboð og hjálp fyri at styrkja um familjulívið og hvønn einstakan.

MEA arbeiður fyri tryggleika og trivnaði í samspælinum millum menniskju. Vit vilja styrkja relatiónir og fyribyrgja mistrivnaði gjøgnum upplýsing, útbúgving og terapi – til gleði fyri børn, ung og vaksin.

Vit styrkja tann einstaka, familjuna, parlagið og foreldrasamarbeiðið eftir møguligan skilnað.

Center for Familieudvikling í Danmark og MEA hava valt at samstarva um at náa hesum endamáli í Føroyum. Center for Familieudvikling hevur longu virkað á sama grundarlag í Danmark síðani 2004, og hevur tí holla vitan og førleikar innan hetta økið, sum við hesum eisini kann koma føroyskum borgarum til gagns.

Gjøgnum góða samstarvið við Center for Familieudvikling hevur MEA eisini atgongd til góða samstarvið, sum CFF hevur við donsk og altjóða vísindafólk. CFF hevur tætt samstarv við vísindafólk frá Aarhus Universitet og granskingarstovnar í USA, Noregi og Hollandi.

## Navn, heimstaður og endamál

§ 1

Navn sjálvsognarstovnsins er *MEA – húsið fyri familjumenning*,

2. stk. Heimstaður sjálvsognarstovnsins er í Klaksvík.

3. stk. Endamál sjálvsognarstovnsins er at skapa góð sambond millum menniskju, bæði í parlagi og uttan fyri parlag. Endamálið er at geva foreldrum og børnum teirra amboð og hjálp til at styrkja um familjulívið og hvønn einstakan.

MEA arbeiðir fyri tryggleika og trivnaði í samspælinum millum menniskju. Vit vilja styrkja sambondini og fyribyrgja mistrivnaði gjøgnum upplýsing, útbúgving og terapi – til gleði fyri børn, ung og vaksin.

Vit styrkja tann einstaka, familjuna, parlagið og foreldrasamarbeiðið eftir møguligan skilnað.

## Stigtakari og stovnari

§ 2

Stigtakari og stovnari av Sjálvsognarstovinum MEA - húsið fyri familjumenning er:

2. stk.

Vígdis Skorheim, Heygavegur 62, 700 Klaksvík, er stigtakari, eldsál og stovnari.

## Ábyrgd

§ 3

Ábyrgd fyri skuld sjálvsognarstovnsins er avmarkað til ognir sjálvsognarstovnsins.

## Stýri sjálvsognarstovnsins

§ 4

Stýri sjálvsognarstovnsins er ein nevnd, sum telur 3 limir.

| | |
|---|---|
| Center for familieudvikling i Danmark . . . . . . | velur 1 lim |
| Umboð fyri stigtakaran eftir § 2, 2. stk. . . . . . . | velur 1 lim |
| Umboð fyri ein av peningaligu ískoytisgevunum . . . . . | velur 1 lim |

2. stk. Nevndarlimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára skeið. Tó situr fyrsta nevndin frá 1. januar 2019 til og við 31. demseber 2020. Um nevndarlimir taka seg úr nevndini í einum valskeiði, skulu nýggir nevndarlimir veljast beinanvegin. Teir nevndarlimir, sum soleiðis hava tikið við, sita, til valskeiðið er úti.

Nevndarlimur kann verða afturvaldur.

## Ábyrgdir nevndarinnar

§ 5

Nevndin hevur ovastu leiðslu sjálvsognarstovnsins um hendi og ábyrgdina av fíggjarviðurskiftum sjálvsognarstovnsins.

2. stk. Nevndin skal á hvørjum ári góðkenna ársroknskapin. Eisini skal nevndin á hvørjum ári leggja tilrættis rakstraræetlan fyri komandi ár.

4. stk. Nevndin setur í starv ein leiðara til at taka sær av dagliga rakstrinum, og sum hevur heimild til at seta fólk innan fyri fíggjarætlanina hjá stovninum.

5. stk. Alt dagligt virksemi, so sum lønargjaldingar, avgreiðsla av rokningum o.s.fr., verður umsitið av leiðaranum.

6. stk. Nevndin hevur ábyrgdina av:

a) at sjálvsognarstovnurin verður rikin í samsvari við hesar viðtøkur,

b) at tilrættaleggingin av virkseminum er innan fyri karmin av endamálsgreinini,

c) at virksemið verður framt so ódýrt sum gjørligt,

d) at raksturin verður skipaður eftir skilagóðum umsitingarhátti so bíliga sum tilber og soleiðis, at áhugamál hjá brúkarunum verða havd í huga.

**Skipan av nevnd**

**§ 6**

Beint eftir valið skipar nevndin seg sjálv við formanni, næstformanni og kassameistara/skrivara. Bert nevndarlimir, sum hava atkvøðurætt sambært §4, kunnu atkvøða. Er neyðugt við øðrum skrivara, skal hesin skjótast upp á fundi.

2. stk. Nevndin ger reglugerð. Reglugerðin skal lýsa virksemi nevndarinnar. Reglugerðin skal undirskrivast av nevndarlimunum. Reglugerðin skal góðkennast av teimum í § 2 nevndu stovnarum og stigtakara.

**Nevndarfundir**
**§ 7**

Nevndarformaðurin innkallar til nevndarfund, tá ið hann heldur tað vera neyðugt, ella tá ið nevndarlimur biður um tað.

2. stk. Nevndarfundir verða hildnir minst eina ferð um hálváríð.

3. stk. Nevndin er viðtøkufør, tá ið minst 2 nevndarlimir eru møttir.

4. stk. Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er atkvøða formansins (næstformansins, um hin er fráverandi) avgerandi

**Gerðabók**
**§ 8**

Gerðabók verður førd á hvørjum fundi, sum verður undirskrivað av nevndarlimum, sum luttóku á fundinum.

Gerðabókin skal fyri hvønn fundin lýsa í minsta lagi:

a) Hvør ið hevur luttikið
b) Hvør hevði fundarleiðsluna
c) Dagskránna og avgerðir, ið tiknar verða
d) Hvør hevur ført gerðabókina
e) Nær fundur byrjaði og endaði.

**Tekningarreglur**
**§ 9**

Sjálvsognarstovnurin verður bundin við undirskriftum av í minsta lagi av tveimum nevndarlimum, harav annar er formaður ella næstformaður, saman við dagliga leiðaranum, um tílíkur er settur.

2. stk. Til avhending, keyp og veðseting av fastari ogn krevst nevndarsamtykt og undirskriving á veðsetingarskjalið av formanni ella næstformanni. Góðkenning krevst frá teimum í § 2 nevndu stovnarum.

3. stk. Servituttar um avhending og veðseting av fastari ogn verða at tinglýsa á føstu ognum stovnsins.

4. stk. Nevnd sjálvsognarstovnsins kann geva øðrum fulltrú til at binda felagið, tó ikki til avhending, keyp og veðseting av fastari ogn.

**§ 10**

Sjálvsognarstovnurin reikar fyri, at allar skrásetingar, innlatingar o.a., sum ásettar eru í lóg ella kunngerð, verða at halda.

**Ársaðalfundur**
**§ 11**

Í seinasta lagi innan 3 mánaðir eftir lokið roknskaparár verður ársaðalfundur hildin við hesi dagsskrá:

a) Frásøgn nevndarformansins frá virki sjálvsognarstovnsins í farna ári
b) Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
c) Framløga av rakstrarætlan fyri komandi ár til góðkenningar
d) Val av grannskoðara
e) Áseting av møguligari nevndarsamsýning

Rætt til at møta á ársaðalfundi hava nevndarlimur ella umboð fyri teir í § 2 nevndu stovnarar, sum hava 1 atkvøðu hvør. Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta, uttan so at lógir ella hesar viðtøkur áseta annað.

**Ársroknskapur**
**§ 12**

Roknskaparár sjálvsognarstovnsins er frá 1. januar til 31. desember í einum álmanakkaári. Fyrsta roknskaparár er frá stovnanini til sama árs 31. desember.

2. stk. Ársroknskapurin skal vera vanliga uppgjørdur, soleiðis at hann greitt sýnir øll virði og allar skuldbindingar, ið til eru, og soleiðis at neyðturviligar avskrivingar verða gjørdar o.t.

3. stk. Stendur óavskrivað fíggjarhall frá árinum frammanundan, skal ársavlopið fyrst verða nýtt til at avskriva hetta.

4. stk. Roknskapurin fyri stovnin skal latast teimum í § 2 nevndu stovnarum.

**Grannskoðan**
**§ 13**

Roknskapur stovnsins skal á hvørjum ári grannskoðast av einum løggildum grannskoðara jbr. § 12.

2. stk. Grannskoðarin kann afturveljast.

**Broyting í viðtøkum**
**§ 14**

Til at samtykkja avgerðir um broyting í viðtøkunum krevst full semja í nevndini, og skulu viðtøkubroytingar góðkennast av teimum í § 2 nevndu stovnarum.

**Avtøka sjálvsognarstovnsins**
**§ 15**

Sjálvsognarstovnurin kann bert avtakast, um nevndin einmælt samtykkir tað, og eftir at teir í § 2 nevndu stovnarar skrivliga hava boðað frá, at tikið verður undir við avgerðini.

2. stk. Verður sjálvsognarstovnurin avtikin, verður vald trímanna avtøkunevnd at taka sær av viðurskiftum í samband við avtøkuna. Ein av nevndarlimunum skal vera løgfrøðingur.

3. stk. Avtøkunevndin verður vald av stovnarunum.

4. stk. Í sambandi við møguliga avtøku kunnu ognir stovnsins undir ongum umstøðum fara til endamál við vinningi fyri eyga

5. stk. Verður sjálvsognarstovnurin avtikin, verða allar ognir stovnsins seldar best møguliga. Eftir at øll skuld sjálvsognarstovnsins er goldin, verður tað, sum eftir er, latið til góðgerandi endamál í Føroyum.

**Soleiðis samtykt av stovnarunum**

**Klaksvík, 28 / januar - 2021**

***Vígdis Skorheim***

Vígdis Skorheim

*Undirskrift/ir*